# OY-arin

TÍÐARRIT FØROYSKIR RADIOAMATØRAR

FRA

Nr. 135 | 26. árið | november 1992



# FØROYSKIR RADIOAMATØRAR *FRA*

Stovnað tann 11. apríl 1965.
Member Society of **INTERNATIONAL AMATEUR RADIO UNION.**
Bústaður: P.O. Box 343, FR-110 Tórshavn, Faroe Islands.
Felagshøli: Hamrabú, Yviri við Strond 22, 100 Tórshavn.
Tlf. +298 1 0644.
Árligt limagjald: kr. 200,- • Lesandi & familjulimir: kr. 100,-


**NEVND FELAGSINS:**

*formaður:*
**OY4AH** Annfinn Hansen tlf. 44 300
*næstformaður:*
•**OY3ft** Frits Thorbek tlf. 1 8345
*kassameistri:*
**OY2VO** Palle Olsen tlf. 1 3694
*skrivari:*
**OY5J** Jóhanna Hansen tlf. 14 031
*samskiftisleiðari:*
**OY3JE** Jan Egholm tlf. 1 4425
*1. tiltaksmaður:*
**OY9R** Otto Rubeksen tlf. 1 5923
*2. tiltaksmaður:*
tlf.

Samband við N.R.A.U:
**OY7ML** Martin Haasen tlf. 1 3793
Samband við I.A.R.U., T.F.L. og P&T:
**OY1A** Arne Juul Arnskov tlf. 1 1740

QSL-manager: **OY2J** Jóhan Isholm
Box 1358, FR-110 Tórshavn tlf. 1 3225

Blaðstjóri & AWARDS-manager:
**OY1A** Arne Juul Arnskov,
Lauritsargøta 11 A,
FR-100 Tórshavn • tlf. 1 1740 & 61 169

**INNIHALD :**


**Frá blaðstjóranum** 3
**Fundarfráboðan**
**Ársaðalfundurin 1992** 4
**Formansins frágreiðing** 5
**Á ársaðalfundi**
**Limalisti okt. 1992** 6-7
**DXCC og Jugoslavia** 8
**Old-Timer Hams, OY1R, Dia, (úr "OZ" 8/92)**
**OY1X, Líggjas, 70 ár** 9
**QSL via.... (1. partur)** 10
**Frá nevndini**
**CQ-WW Contest**
**Nýggjur formaður** 11
**Packet Radio**
**OY9JD**
**DX-vánirnar** 12
**Morokulien**


**OY6FRA** hoyrist hvørt týskvøld á repeataranum kl. 19.30.
Regluligu fundirnir eru annaðhvørt mikukvøld kl. 20.00 í felagshølinum Hamrabú, Yviri við Strond.

**FELAGSSTØÐIRNAR:**

***OY6FRA***
Felagshúsið • IP 62 OA • ant. 5el. rotary beam til 6, 10, 15 og 20 m. • wire ant. og GP til 40 m. • wire ant. til 80 og 160 m.

***OY3REA***
Umsetari á Sornfelli • IP 62 MB • innp. 145.025 MHz • útp. 145.625 MHz • ant. vertical • • orka 25 watt • 1750 Hz.

***OY6VHF***
Vitasendari á Húsareyni • IP 62 OA • útp. 144.825 MHz • orka 25 watt • 50 watt ERP • • ant. horisontal.

***OY6UHF***
Vitasendari á Húsareyni • IP 62 OA • útp. 432.885 MHz • orka 25 watt • 50 watt ERP • • ant. horisontal.

Hesi hava gjørt hetta nummarið av ***OY-aranum*** : 11874

OY1A, OY2H & OY3FT

framl. Sisero tlf. 19766 — 1.2639

*Permumynd:* Morokulien (OY1S) OLE 19192

auto 11234

## *Frá blaðstjóranum*

Ein nevnd hevur tað ikki altíð so lætt, og sjáldan fær hon tøkk fyri tað arbeiði, hon ger.
Tað kundi verið nakað, um limirnir gjørdu nakað fyri felagið, men har knípur tað.
Høvdu limir bara møtt upp til felagsfundir o.a., hevði tað verið so hugaligt hjá nevndarlimunum.
Tosað varð við stórum stavum á aðalfundinum, og vit mugu bert vóna, at nýggja nevndin verður før fyri at rætta kósina hjá FRA, sum hevur siglt vandasjógv seinastu árini.
Seinastu árini hava vit ikki fingið nógvar nýggjar limir, og teir eldru, sum byrjaðu felagið, eru meira ella minni horvnir.
Áhugin er minkaður, ja, onkur av teim, sum vóru sera virknir á bondunum fyrr, eru burtur. Tað sær tó ut til, at her er ljós fyri framman.
Vit hava nú fingið nakrar nýggjar limir við sendiloyvi, har onkur er sera virkin við mikrofon og lykli.
Sum nakað nýtt eru vit eisini komnir við í skipanina við mailbox og digipeatarum.
Nevndin er vorðin lutvíst broytt, og verða lógaruppskotini góðtikin á eykaaðalfundinum í november, so hava vit jú longu vanligan ársaðalfund aftur um nakrar fáar mánaðar, og longu nú eiga vit at hugsa um nevndarvalið í 1993, har vit skulu hava 3 limir valdar.
Komandi ár fáa vit ætlandi nýggja kunngerð um amatørradio í Føroyum. Í Danmark kom ein slík 1. juli 1992.
Tað er gleðiligt, at "OY-arin" hesa ferð hevur nýggjar pennar, og vónandi fara aðrir limir eisini at hjálpa til við tilfari til blaðið, ella møguliga geva blaðstjóranum hugskot.
Hugaligt hevði verið at átt greinar liggjandi niðurfyri til komandi "OY-arar"!

*OY1A*
*2H týddi.*

## *Fundarfráboðan*

Eykaaðalfundur verður í Hamrabú leygardagin, 28. november 1992, klokkan 15.00 við hesari dagsskrá:

1. Lógarbroyting
a) grein 6, 1. stk.: "september/oktober" verður broytt til "februar/mars".
b) grein 7, 4. stk.: "31. august" verður broytt til "31. januar".
c) grein 9: "15. august" verður broytt til "15. januar".
d) grein 10: "1. september" verður broytt til "1. januar".
2. Roknskapurin fyri 1991 og fíggjarstøðan.
3. Ymist.

Nevndin.

## *Ársaðalfundurin 1992*

Árligi ársaðalfundurin varð hildin í Hamrabú leygardagin, 3. oktober 1992.
Tá formaðurin, Jóhanna, OY5J, hevði boðið teim 20 fundarfólkunum vælkomin og sett fundin, varð Alif, 5A, valdur til fundarstjóra.
Hann gav orðið víðari til 5J, sum greiddi frá farna árinum. (Hendan frágreiðingin verður prentað á øðrum stað í blaðnum).
Roknskapurin fyri 1991.
Kassameistari okkara, Otto, fór tíðliga hetta árið til skips, og tí varð tiltakslimurin, Marit, OY3MT, við sera stuttum skotbráði sett sum kassameistari í hansara stað. Av tí at roknskapurin tá lá á teldu, var Marit ikki før fyri at gera annað enn at hava skil á inn- og útgjaldingum, so hvørt tær komu. Upplýst var, at FRA skyldaði 89.000 krónur..
Avgjørt varð, at roknskapurin skuldi leggjast fyri á eykaaðalfundi næsta mánað, og so tá taka støðu til tær ætlaðu lógarbroytingarnar.
Síðani varð komið til nevndarvalið. Har skuldu veljast 2 nevndarlimir og 2 tiltakslimir. 27 atkvøðuseðlar vóru komnir inn, harav vóru 2 ógyldugir. Atkvøðurnar fullu soleiðis:

| | |
|---|---|
| Jan Egholm, OY3JE | 13 |
| Holgar Jacobsen, OY3HJ | 6 |
| Ole Nicolajsen, OY3QN | 11 |
| Palle Olsen, OY2VO | 9 |
| Otto Rubeksen, OY9R | 11 |

Teir báðir Ole, OY3QN, og Otto, OY9R, samdust um, at Ole skuldi gerast nevndarlimur og Otto 1. tiltakslimur. Hetta varð góðtikið.Teir 2 nýggju nevndarlimirnir verða sostatt Jan, OY3EJ, og Ole, OY3QN. Tiltakslimir
verða so Otto, OY9R, og Palle, OY2VO.
Thormann, OY5T, varð síðani afturvaldur til grannskoðara. Har var breið semja um tær ætlaðu lógarbroytingarnar, men, av tí at fundurin ikki var viðtøkuførur, varð avgjørt, at fáa hetta avgreitt á komandi eykaaðalfundi.
Framtíðin
Hans Jacob, OY2H, helt, at tað var ótrúligt, at nevndin sendi limunum eina fundarfráboðan, har hon (nevndin) m.a. segði frá, at hon var kedd av at vera noydd til at gera alt, sum gerast skuldi. Tað ber ikki til, at skriva slíkt. Nevndin kundi sagt seg frá. (2H hevur grein um fundin aðrastaðni í hesum blaðnum)
Formaðurin, 5J, helt fast við, at tað ikki bert var upp til fundir, og ongin ger nakað.
Frits, OY3FT, helt, at 2H hevði rætt í nógvum. Tað er keðiligt, um so er, at nevndin fyriskipar okkurt, við luttøku uttanífrá, at ongin møtti. Ikki ber til, at halda fram, um onki hendir. Heldur ikki bert tað til, at hava dýra útgerð standandi, sum ikki varð nýtt. Vit klára ikki at gjalda skuldina, Tá fráboðanin var skrivað, sum hon var, var tað fyri at "aktivera" limirnar.
Alif, 5A, dugdi væl at síggja, at fundarbráboðanin østi fólk, men av og til skal verða sparkað hart. Hann skilti væl 2H, og helt, at tað vóru alt ov fáir sum hann, og tað hevði verið betri, um fleiri høvdu latið við seg koma, sum hann.
Formaðurin, 5J, kundi hugsað sær 5 (nevndarlimir), sum vildu gera nakað.
Edvard, 7EK, kundi hugsað sær møguleikan at stilla fólk upp á aðalfundinum. Semja var um, at nevndin skuldi kanna hetta.
Otto, 9R, kom inn á okkara fíggjarligu trupulleikar. Virksemið er vorðið minni og útgerðin skal verða røktað.
2H helt, at vit høvdu ikki so stóra útgerð fyri neyðini, og her vóru bæði Frits, 3FT, og Arne, 1A, samdir við 2H. Tosað varð um at selja burturav, fyri at minka um skuldina.
Jon, 9JD, gjørdi vart við, at í 1987, tá útgerðin varð keypt og sett upp, var áhugin stórur, men ídag er tað ongin, sum t.d torir upp í mastrarnar.
Í hesum sambandi fortaldi Alif, 5A, at antennur sum okkara halda 10 ár í t.d. Danmark, halda ikki meira enn eini 2-3 ár her hjá okkum.
Ymisk uppskot vóru um, hvussu vit skuldi fáa slætt borð: lutaseðlar, bingo, aktiur, søla av útgerð o.s.fr. Við núverandi limagjaldi ber ikki til at greiða útreiðslur til antennur, sum eru dýrar at keypa, og at røkja, um sæð varð burtur frá vanligum tráðantennum..
Semja varð um, at nýggja nevndin, átti at fara til verka beinanvegin, og finna eina loysn á okkara fíggjarligu trupulleikum, og, um møguligt, hava eina loysn til komandi eykaaðalfund.
Formaðurin, 5J, takkaði fyri fundin, og kundi taka til eftirtektar, at fráboðanin, hevði virkað eftir ætlan.
Fundur lokin kl. 1645.

1A, fundarskrivari.

2H týddi.

## *Formansins frágreiðing 1992*

So er aftur eitt ár farið, og vit skulu hava aðalfund og frágreiðing um, hvat er farið fram í farna ári. Tíverri kunnu vit heldur ikki í ár fortelja um nógv virksemi ella í heila tikið nakað virksemi av týdningi.

Mikudagsfundirnir hava verið, men við sera lítlari luttøku.

"OY-arin" er útkomin 3 ferðir. Arne, OY1A, hevur staðið fyri hesum, við góðari hjálp frá OY2H og OY3FT.

Eingir altjóða fundir hava verið í farna ári.

Repeatarin og beaconin koyra. 20m-antennan hevur tað alt annað enn gott.

Annars kunnu vit koyra á øllum bondum uttan 24 og 10 MHz.

Vit kunnu nú koyra á 160m-bandinum, bæði á CW og SSB.

Í løtuni er tann stóri TS940S í ólagi. Feilurin er funnin, men tað er trupult at fáa fatur á transistorinum, sum skal til.

Skeið hevur verið. 4 hava fingið D-sendiloyvi, og ein hevur fingið A-sendiloyvi.

20 WAOY eru latin. 1 OY, 1 DL og restin til Sovjetrusland.

Tað eru koyrd umleið 450 QSO frá OY6FRA.

Contestkallimerkið, OY6A, hevur verið brúkt fleiri ferðir. CQWW við yvir 1400 QSO.

Til QSL-støðina eru komin 7600 QSL-kort. Tað eru ikki send so nógv, umleið helvtin.

Sum nakað nýtt hevur verið roynt at senda tíðindi á repeataranum hvønn týsdag. Tað hevur verið lýst í Dimmalætting hvønn týsdag, men fáir lurtarar hava verið, sum hava sagt frá.

Nøkur fá tiltøk vóru seinasta vetur. Eitt var væl vitjað, men hini vóru fá til.

Vit stóðu fyri páskakappingini í ár. 11 OYarar, 28 OZ og 6 frá OX og ein lurtari var við.

OX3CS, Carsten, í Julianehåb hevði flest stig. So kom 6A og 1HJ.

Hetta var so tað, sum kundi fáast burtur úr tí lítla virksemi, sum hevur verið í okkara kæra felagi, sum vit nokk, hóast alt, eru góð við.

## *Á ársaðalfundi í Hamrabú*

Tað mundi vera mangur, ið undraðist, tá fundarboð komu til vanliga ársaðalfundin, sum verða skuldi leygardagin, 3. oktober 1992 klokkan 1500.

Sjálvur undraðist eg stórliga, og gjørdi av, at eg skuldi á fund, um ikki fyri annað, so fyri at finna út av, hvussu nevndin hevði tað, tí tað var púra greitt, at støðan var ikki góð.

Sjálvandi var tað í lagi at hava fund, har skráin var sambært grein 6 í felagslógini, men tað, sum skrivað var í fundarfráboðanini annars, var heilt burturvið.

Nú hoyrdi eg undan fundinum, at orðaljóðið skuldi "provokera" limirnar! - og tað segði formaðurin eisini okkurt um, tá hon sleyt tann 2 tímar langa fundin. Ein fundur, sum var lýstur í úrtíð, tí har var m.a. ongin roknskapur at leggja fram til góðkenningar - men nú kann tað vera tí, at nevndin ikki kennur grein 6 í felagslógini - tí mátti verða lýst til ein eykaaðalfund, og so hava roknskapin kláran til góðkenningar!

Nú, eg skrivi hetta, fer oktober at gerast til november, og onki er frætt frá nevndini, men vit vita jú, at nevndin, sum hon sjálv sigur: "er troytt av at vera noydd til at vera tey einastu, sum skulu gera nakað"! - Ja, álvaratos, kann tað sigast betur?

Tá eg fór í Hamrabú tann leygardagin, hevði eg gjørt av, at fundarfólk skuldu sleppa at hoyra, hvat eg meinti um støðuna, sum hon var, og tað vóni eg, at tey flestu fingu eina fatan av, og hugaligt var hjá mær at bæði Frits og Alif søgdu sína skilagóðu hugsan um tað, sum eg hevði lagt fram

Onki orð frá nevndini annars um avtøku av felagnum.

Kanska tí, at eg hevði loyst av posabandinum í góðari tíð.



# *Limalisti, oktober 1992*

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 203 | | | Apol, Paula | Dalagøta 15 | 100 Tórshavn |
| 152 | A | OY1A | Arnskov, Arne Juul | Lauritsargøta 11A | 100 Tórshavn |
| 218 | A | OY1S | Arnskov, Sheila | Lauritsargøta 11A | 100 Tórshavn |
| 397 | D | OY1PB | Bertelsen, Poul Erik | Íslandsvegur 37 | 100 Tórshavn |
| 180 | | | Bláfoss, Johannes | Hoyvíksvegur 25 | 100 Tórshavn |
| 092 | A | OY1VN | Bláhamar, Sámal | Tjarnarlág 41 | 100 Tórshavn |
| 272 | D | OY7I | Bláhamar, Tórharda | Tjarnarlág 41 | 100 Tórshavn |
| 048 | A | OY8YL | Breckmann, Nanly | Lutzenstrøð 14 | 100 Tórshavn |
| 388 | | | Bærentsen, Anette | | 335 Leynar |
| 297 | D | OY3P | Bærentsen, Poul Kj | | 335 Leynar |
| 338 | A | OY3PF | Christiansen; Petur F | Boks 99 | 11Tórshavn |
| 355 | D | OY1O | Christiansen, Óli | Sjúrðargøta 17 | 100 Tórshavn |
| 204 | | | Dalbø, Jørleif á | | 530 Fuglafjørður |
| 392 | D | OY5BD | Dali, Birgir í | Mýrisnípuvegur 37 | 100 Tórshavn |
| 394 | | | Dali, Johann í | Við Sandá 5 | 100 Tórshavn |
| 161 | A | OY8S | Dali, Steinbjørn í | Norðurrás 6 | 100 Tórshavn |
| 270 | A | OY9JD | Dam, Jón | Postbox 2038 | 165 Argir |
| 380 | A | OY1F | Danielsen, Erik | Mýrugøta | 700 Klaksvík |
| 381 | | | Danielsen, Helgi | á Hædd | 700 Klaksvík |
| 057 | | | Davidsen, Eli | Í Svanga 9 | 100 Tórshavn |
| 253 | A | OY7MD | Djurhuus, Martin | | 970 Sumba |
| 153 | A | OY5AD | Durhuus, Arnbjørn | Lýðarsvegur 16 | 188 Hoyvík |
| 003 | A | OY2H | Egholm, Hans J | Strond 93 | 100 Tórshavn |
| 378 | D | OY3JE | Egholm, Jan | Boks 3033 | 110 Tórshavn |
| 049 | A | OY2YL | Egholm, Marjun | Strond 93 | 100 Tórshavn |
| 353 | OY-105 | | Frederiksen, Ólavur | Tróndargøta 7 | 100 Tórshavn |
| 396 | | | Gerðalíð, Jógvan | Heygavegur 21 | 700 Klaksvík |
| 010 | A | OY7ML | Haasen, Martin | Boks 184 | 110 Tórshavn |
| 327 | | | Hádal, Arni | Hvarvið 14 | 100 Tórshavn |
| 019 | A | OY2X | Hammer, Jógvan | Boks 1001 | 110 Tórshavn |
| 112 | A | OY3YL | Hammer, Lis | Boks 1001 | 110 Tórshavn |
| 013 | A | OY5A | Hansen, Alif | Miðrás 6 | 100 Tórshavn |
| 356 | | OY4AH | Hansen, Annfinn | Boks 41 | 530 Fuglafjørður |
| 287 | D | OY7JH | Hansen, Jens | Grønlandsvegur 58 | 100 Tórshavn |
| 225 | A | OY5J | Hansen, Jóhanna | Miðrás 6 | 100 Tórshavn |
| 179 | A | OY8KH | Hansen, Kári | | 490 Strendur |
| 392 | | | Hansen, Remi G. | Niels Finsensgøta 45 | 100 Tórshavn |
| 245 | D | OY9H | Haraldsen, Harald | Boks 1060 | 110 Tórshavn |
| 310 | | | Holm, Kári | Hornavegur 10 | 188 Hoyvík |
| 342 | D | OY7XA | Hvannastein, E | U Heygnum 10 | 100 Tórshavn |
| 196 | D | OY5R | Højgaard, Rógvi | Langatún 8 | 100 Tórshavn |
| 004 | A | OY2J | Isholm, Jóhann | Vesturgøta 13 | 100 Tórshavn |
| 393 | | | Jacobsen, Andreas | Berjabrekka 65 | 100 Tórshavn |
| 375 | A | OY1HJ | Jacobsen, Holgar | | 380 Sørvágur |
| 091 | A | OY7Z | Joensen, Oddmar | Undir Fossum | 700 Klaksvík |
| 248 | A | OY7JJ | Johannesen, John | Djúpagilsvegur 40 | 188 Hoyvík |
| 067 | A | OY5NS | Johannessen, Niels S | Boks 29 | 110 Tórshavn |

# F.R.A.

## FØROYSKIR RADIOAMATØRAR

## ÁRSROKNSKAPUR

## FYRI 1991

# FÍGGJARSTØÐA TANN 31. DESEMBER 1991

## O G N

| 1990 | | |
|---|---|---|
| 0 | Kassin ................................ | 537,00 |
| 9 | Giro FR ................................ | 12.315,14 |
| 0 | Giro DK ................................ | 76,78 |
| 4 | P/F Føroya Banka, c.c. 264.572.0 ......... | 516,32 |
| 21 | P/F Føroya Banki, bók 651.263.6 ......... | 5.608,55 |
| 6 | P/F Sjóvinnubankin, folio 100.953.4 ...... | 6.148,06 |
| 2 | P/F Sjóvinnubankin, folio 100.988.7 ...... | 1.686,19 |
| 2 | Føroya Sparikassi, bók 645.009.3 ......... | 26.814,00 |
| 29 | Skuldarar ............................ | 13.140,66 |
| 73 | **SAMLAÐ REIÐUFÆ** .......................... | **66.842,70** |

## RAKSTRARGØGN:

### INNBÚGV:

| | | |
|---|---|---|
| 22 | Innbúgv í Hamrabú, saldo 1/1-91 .......... | 26.823,00 |
| 7 | + Tilgongd í 1991 ....................... | 0,00 |
| 2 | - 10% avskriving 1991 .................... | 2.682,30 |
| 27 | **Saldo pr. 31. desember 1991** .............. | **24.140,70** |

### MASTRAR & ANTENNUR:

| | | |
|---|---|---|
| 42 | Mastrar & antennur, saldo 1/1-91 ......... | 47.319,00 |
| 10 | + Tilgongd í 1991 ....................... | 0,00 |
| 5 | - 10% avskriving 1991 .................... | 4.731,90 |
| 47 | **Saldo pr. 31. desember 1991** .............. | **42.587,10** |

### RADIOÚTGERÐ O.A.:

| | | |
|---|---|---|
| 153 | Radioútgerð o.a., saldo 1/1-91 ........... | 138.079,00 |
| 0 | + Tilgongd í 1991 ....................... | 0,00 |
| 15 | - 10% avskriving 1991 .................... | 13.807,90 |
| 138 | **Saldo pr. 31. desember 1991** .............. | **124.271,10** |

| | | |
|---|---|---|
| 285 | **SAMLAÐ OGN** ............................ | **257.841,60** |
| ==== | | ========== |

## RAKSTRARROKNSKAPUR FRÁ 1. JANUAR TIL 31. DESEMBER 1991

| 1990 | INNTØKUR: | |
|---|---|---|
| 7 | Limagjald ................................ | 13.050,00 |
| 0 | Søla av loggbókum v.m. .................... | 1.430,00 |
| 1 | Lýsingar í OY-arinum ...................... | 1.260,00 |
| 8 | Studningur frá Føroya Landstýri ........... | 0,00 |
| 20 | Endurgjald frá Føroya Brunatrygging ....... | 24.056,00 |
| 0 | QSL-gjald ................................. | 200,00 |
| 36 | **INNTØKUR ÍALT** ............................ | **39.996,00** |
| | ÚTREIÐSLUR: | |
| 0 | Limablaðið OY-arin ........................ | 3.594,50 |
| 1 | Porto ..................................... | 932,20 |
| 1 | Licenser .................................. | 200,00 |
| 1 | Limagjald IARU ............................ | 567,84 |
| 2 | Tryggingar ................................ | 1.721,00 |
| 3 | Telefon ................................... | 2.502,00 |
| 3 | Skrivstovuhald v.m. ....................... | 2.008,50 |
| 2 | Ferðakostnaður ............................ | 0,00 |
| 5 | Radioútgerð ............................... | 0,00 |
| 5 | Viðlíkahald antennur ...................... | 3.399,21 |
| 0 | Viðlíkahald Hamrabú ....................... | 122,00 |
| 0 | Keyp av bókum v.m. ........................ | 2.301,06 |
| 2 | 25 ára stovningarveitsla .................. | 0,00 |
| 0 | Ymiskt .................................... | 533,00 |
| 11 | **ÚRSLIT ÁÐRENN RENTUR & AVSKRIVINGAR** ....... | **22.114,69** |
| | RENTUR: | |
| 15 | Rentuútreiðslur ........................... | 15.109,92 |
| 2 | - Rentuinntøkur frá banka og giro ......... | 1.025,04 |
| 8 | - Rentuinntøkur frá skuldarum ............. | 0,00 |
| 6 | **ÚRSLIT ÁÐRENN AVSKRIVINGAR** ................ | **8.029,81** |
| | AVSKRIVINGAR: | |
| 0 | Avskrivað uppá skuldarar .................. | 14.877,39 |
| 6 | **ÁRSÚRSLIT** ................................. | **-6.847,58** |
| ==== | | =========== |

## S K U L D

| 1990 | | |
|---|---|---|
| 80 | P/F Sjóvinnubankin, lán .................. | 81.320,31 |
| 0 | Ognarar .................................. | 0,00 |
| **80** | **SAMLAÐ SKULD ............................** | **81.320,31** |

**EGINOGN:**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 221 | Saldo pr. 1. januar 1991 .... | 204.590,97 | |
| 6 | + Ársúrslit 1991 ........... | -6.847,58 | |
| 22 | - Avskrivingar 1991 ........ | 21.222,10 | |
| **205** | **EGINOGN PR. 31. DESEMBER 1991 ..........** | | **176.521,29** |
| **285** | **SAMLAÐ SKULD ............................** | | **257.841,60** |
| ===== | | | =========== |

Frammanfyri standandi ársroknskapur og fíggjarstøða eru kannað og uppstillað út frá førdum bókhaldið og móttiknum upplýsingum. Allar fíggjarkonti eru avstemmaðar pr. 31. desember 1991.

Tórshavn, tann 5. november 1992

**Otto Rubeksen, OY9R**
**kassameistari**

**Thormann Kruse, OY5T**
**grannskoðari**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 173 | D | OY7EK | Kjeld, Edvard | Brobbersgøta 15 | 100 Tórshavn |
| 172 | A | OY5T | Kruse, Thormann | Vesturgøta 20 | 100 Tórshavn |
| 077 | A | OY2EL | Larsen, Elith | Essalág 8 | 100 Tórshavn |
| 389 | | | Leyni, Eyrith | Tórgarðsgøta 4 | 100 Tórshavn |
| 006 | A | OY4M | Mellemgaard, Maison | Flatabø 9 | 470 Eiði |
| 385 | | | Mikkelsen, Kári | Bumshamarsvegur | 700 Klaksvík |
| 333 | | | Monz, Suitbert | Am Kønigsborn 25 | D6500 Mainz/Finthen 21 |
| 065 | A | OY9IM | Mortensen, Johannes | Gróthúsvegur 17 | 188 Hoyvík |
| 103 | A | OY7TM | Mouritsen, Tórmóð | Gróthúsvegur 13 | 188 Hoyvík |
| 351 | A | OY3QN | Nicolajsen, Ole | Javnagøta 5 | 100 Tórshavn |
| 043 | A | OY3H | Olsen, Heri | Boks 1065 | 110 Tórshavn |
| 273 | D | OY9YL | Olsen, Jóhanna S | Boks 1065 | 110 Tórshavn |
| 374 | D | OY2LO | Olsen, Lisbeth | Reynstún 5 | 160 Argir |
| 373 | A | OY2VO | Olsen, Palle | Reynstún 5 | 160 Argir |
| 386 | | | Olsen, Willemoes | Undir Klakki | 700 Klaksvík |
| 254 | | | Petersen, Rói | Mýrisnípuvegur 31 | 100 Tórshavn |
| 382 | | | Poulsen, Eli | Undir Hálsi | 700 Klaksvík |
| 379 | | | Poulsen, Julius | Boks 72 | 700 Klaksvík |
| 376 | | | Radioeftirlitið | Boks 1288 | 110 Tórshavn |
| 022 | A | OY1R | Rasmussen, Andr. | Prestsvegur | 700 Klaksvík |
| 343 | D | OY1OR | Reinert, Oddur | Boks 2153 | 165 Argir |
| 052 | A | OY9R | Rubeksen, Otto | Boks 2080 | 165 Argir |
| 339 | | | Seiffert, Stanley | 10525 180th<br>S E Snohomish | <br>98290 Washington |
| 244 | A | OY9K | Sigvardsen, Karl E | Fútalág 25 | 100 Tórshavn |
| 002 | A | OY7J | Sivertsen, Júst | Boks 2206 | 165 Argir |
| 098 | A | OY4HQ | Solberg, Hans E | | 655 Nes |
| 336 | A | OY9A | Solberg, Henrik | | 655 Nes |
| 299 | A | OY1CT | Thomsen, Carsten | Boks 25 | 340 Kvívík |
| 358 | | | Thomsen, Ervin J | Láarvegur 4 | 100 Tórshavn |
| 383 | | | Thomsen, Høgni | Undir Hálsi | 700 Klaksvík |
| 331 | A | OY3FT | Thorbek, Frits | Javnagøta 8 | 100 Tórshavn |
| 391 | D | OY3RT | Thorbek, Rúni | Javnagøta 8 | 100 Tórshavn |
| 332 | A | OY3MT | Thorbek, Marit | Javnagøta 8 | 100 Tórshavn |
| 243 | A | OY9J | Úlvsá, Jørgin M | Fjósagøta 6 | 100 Tórshavn |
| ~~017~~ | ~~A~~ | ~~OY1X~~ | ~~Váli, Líggjas á~~ | ~~Skorugøta 9~~ | ~~100 Tórshavn~~ |
| 189 | A | OY8OV | Vang, Óli | Traðabrekka 25 | 100 Tórshavn |
| 074 | A | OY3PJ | Vitalis, Poul J | Velbastaðvegur 29 | 100 Tórshavn |
| 111 | A | OY2KH | Weihe, Klæmint | Marknagilsvg. 64 | 100 Tórshavn |
| 384 | | | Zachariassen. K E | Bumshamarsvegur | 700 Klaksvík |
| 100 | A | OZ1ABZ | Ziska, Johan | Eberlinsvej 1 | DK3400 Hillerød |

## *Gevið gætur!*

Um so er, at adressan hjá tær á baksíðuni hevur reyða rammu, so er tað tí, at tú "OY-aranum" kunnugt, ikki hevur goldið limagjaldið fyri 1992.
Send limagjaldið sum skjótast, ella tosa við kassameistaran, um so er, at tú hevur goldið og hevur kvittan.

## *DXCC og Jugoslavia*

ARRL, American Radio Relay League, hevur í tíðindaskrivi dagfest 13. oktober í ár boðað frá, at ráðgevandi nevndin viðv. DXCC-reglum hevur viðmælt, at tað, sum er eftir av Jugoslavia, verður verandi á DXCC landalistanum.
Hesin parturin er Serbia, YU1, Montenegro, YU6, Vojvodina, YU7, og Kosovo, YU8.
Eisini verður viðmælt, at Kroatia, Slovenia, Bosnia-Hersegovina og Makedonia verða roknað sum sjálvstøðug DXCC-lond.
Kroatia, fyrr YU2, við forskoytinum, 9A, frá 26. juni 1991 at rokna.
Slovenia, fyrr YU3, við forskoytinum, S5, frá 21. juni 1991 at rokna.
Bosnia-Hersegovina, óbroytt (YU4), frá 15. oktober 1991 at rokna.
Makedonia, óbroytt (YU5), frá 8. september 1991 at rokna.
Munurin millum hesi 4 londini er óivað, at tey tvey fyrstnevndu eru vorðin limir í ITU og IARU , meðan hini bæði londini ikki enn hava fingið hesa alheims
viðurkenningina.
Spurningurin verður nú viðgjørdur í Awards-nevndini hjá ARRL.
QSL-kort úr hesum 4 møguliga nýggju londunum, verða ikki roknað við í umsóknum um DXCC fyrr enn almenn fráboðan um upptøkuna á DXCC landalistanum er komin.

1A, týðing 2H.

## Old Timer Hams
## OY1R, „Dia", Klaksvik

OY1R, Andreas Rasmussen, kaldet Dia, stammer fra Fugloy, den østligste af Færøerne. Han bor i Klaksvik, er 81 og er stadig meget aktiv radioamatør.

Han kører CW på HF-båndene, nu især på 30 m båndet, som han også finder er særlig godt til forbindelser mellem OY og OZ. Desuden kan man meget ofte træffe Dia på Sornfell-repeateren på 145.625 MHz.

Det var omkring 1950, at han besluttede sig for at blive radioamatør. Dengang fandtes ingen klub eller undervisningsmulighed for radioamatører i Klaksvik. Så, sammen med en god ven, der også var interesseret, gik han i gang med at træne morse. Desværre blev vennen syg og måtte opgive. Dia sejlede dengang som maskinmand på den lille færge „Brittain Pride" mellem Klaksvik og Tórshavn, og under sejladsen kunne han gennem motorlarmen lytte til en kommerciel CW-station, der daglig sendte med 50 - 60 tegn pr. min., modtaget på skibets radio. Den klarede han efterhånden at følge, og teknik lærte han sig gennem et dansk brevkursus i radioteknik, ikke specielt beregnet for kortbølgeamatører. Han er et beskedent menneske, og han sagde til mig: „Jeg har ikke noget at prale af, og som radiotekniker er jeg ikke meget værd". Men det er nok ikke helt rigtigt. Fra anden side har jeg fået at vide, at man på telegrafstationen i Tórshavn var meget imponerede af hans kunnen, da han som selvlærd i 1954 mødte op, bestod prøven og fik sin licens.

Han fik call'et OY1R, og han startede med grej, han selv havde bygget. Først en sender med 2 rør, 6L6-ere. Den blev lidt senere forsynet med en Geloso-vfo. Den næste sender havde 2E24 i PA-trinnet. Derefter fulgte en sender med Philips-røret PE 1/100, og den kørte han CW med i en hel del år.

Da så OZ1QM, der dengang boede på Amager, solgte sin station fra 1952, købte han den og fik en skipper, han kendte godt, til at tage den med på sit fragtskib, der sejlede mellem København og Færøerne.

Nu har han en ICOM IC 730, som kører alle HF-bånd undtagen 160 m. OZ1QM rådede ham til at lave en Zepp-antenne med åben



den har hidtil kunnet modstå de voldsomme storme. „Det er måske ikke lige netop en DX-antenne, men den er i hvert fald billig at sætte op igen, hvis den skulle blæse ned", siger Dia. Den kunne afstemmes med en hjemmelavet tuner med særskilt spole til hvert bånd, efter recept fra OZ1QM. Den har indbygget standbølgemeter, der begge arbejder med telekommunikation, den ene i telefonvæsenet og den anden i det færøske radiotilsyn.

I Klaksvik er der høje fjelde på begge sider af fjorden, og der er kun åbent i syd-østlig retning, så det går bedst til Europa. Men også til USA og Canada går det forholdsvis godt, selvom det må over fjeldet i en lidt stor udstrålingsvinkel.

Trods disse naturlige hindringer har Dia haft ialt ca. 25.000 QSO-er, og da en amerikaner W2KF, var så venlig at tilbyde at være hans QSL-manager, sagde han: „Ja, tak". Det har gennem mange år sparet ham for en masse QSL-skrivning.

Dia ved også en masse om forholdene på Færøerne i gamle dage, og han glæder fortsat mange med sine hyggelige og

# *OY1X, Líggjas á Váli, 70 ár*



Hósdagin, 3. september 1992, fylti 1X 70 ár. Føðingardagurin varð hildin í Pállstovu í Havn, og vóru o.u. 250 vinir og kenningar úr øllum landinum, ja, líka úr Danmark og Grønlandi, komin saman at heiðra Líggjasi henda dagin saman við familjuni.
Líggjas er væl kendur millum radioamatørar í Føroyum, tó einabest av teimum, sum nú mugu metast sum "old timers".
Eftir at hava gingið til morsing og teknik hjá pionerunum í Klaksvík, Dia/1R og Páll/1P, fingu teir tríggir, Líggjas/1X, Jógvan/1J og Robert/1L sendiloyvi í 1958.
Í loggbókini sæst, at Líggjas hevði sítt fyrsta QSO við VE3ES 13. september 1958 kl. 2315 á 14 Mc/s. Fyrsta móttakaran keypti hann brúktan frá einum radioamatøri í Grimsby, einaferð hann var niðri við gamla Skálabergi. Sendarin var ein 10 w Geloso. Samanlagt hevur hann havt út ímóti 5000 QSO. Støðin, hann nú hevur, er ein Eicom IC 720A 100 w tranceivari við GP-multiband-antennu.
Líggjas var ímillum teir 10, sum á grækarismessu 1965 komu saman at tosa um møguliga stovnsetan av føroyskum radioamatørfelag. Hann var eisini í Tórsgøtu, sunnudagin 11. apríl 1965, og har stovnsettu felagið, "FØROYSKIR RADIOAMATØRAR".
Í fyrsta limalistanum í "OY-aranum" frá apríl 1965, er 1X skrásettur sum limur nr. 1.
Á hesum sama fundi var Líggjas einmælt valdur til felagsins fyrsta grannskoðara. Hann var einmælt afturvaldur á ársaðalfundinum, 15. august 1965, og røkti hann hetta starvið til lítar, til hann segði seg frá á ársaðalfundinum, 14. august 1966, tá hann eina tíð flutti aftur til Klaksvíkar at búgva.
Nú, Líggjas hevur rundað tey sjeyti, fara vit at ynskja honum hjartaliga tillukku við degnum, við tøkk fyri tann stuðul, hann hevur veitt felagnum, serliga tey fyrstu árini.
Og nú árini fara at merkjast og sjónin er farin at bila nakað, so ynskja vit Líggjasi og XYL, Annu, sum altíð er klár við einum góðum drekkamunni og drýlbita, tá ein og annar støkkur inn á gólvið, nógv góð ár saman í Skørugøtu 9, og ikki minst vóna vit at hoyra hansara eyðkendu og vælmoduleraðu rødd enn meira á HF-bondunum í tíðini, sum kemur.

3YL og 2X

# *QSL via... (1. partur)*

Tá tú ert vorðin virkin radioamatørur, og ert byrjaður at "koyra", sum tikið verður til, verður tú greiðir yvir fyribrigdið, QSL, tí tað kemur fyri hvørja ferð, tú hevur samband við onkran annan radioamatør. Teir flestu siga QSL via bureau, stytt buro, men hesin møguleiki finst ikki hjá øllum, so onkur vil avgreiða QSL "direct", beinleiðis, ella via manager, um QSL-avgreiðslumann.
Lat okkum taka mest vanliga háttin fyrst, nevniliga "QSL via buro, og siga eitt sindur um ta arbeiðsgongdina: tú og mótparturin hava í QSO avrátt at senda QSL via buro. Tá skrivar tú eitt QSL-kort til hansara og leggur tað fyrst í tína egnu goymslu av QSL-kortum, sum tú ætlar at senda um QSL-støðina, og tá tú heldur at rúgvan er passalig, letur tú kortini inn til QSL-støðina, og so ert tú leysur av teimum. QSL-støðina hjá okkum hevur Johan Isholm, OY2J, um hendi og hann hevur boks 1358 í Havn. Tað ber til at posta kortini til 2J, ella, um tú býrt í Havn, at leggja kort tíni í QSL-kassan í Hamrabú, sum 2J tømir javnan. Tað einasta, tú skalt minnast til, er at leggja kortini hvørt land fyri seg, t.v.s. skilja tey í alfabetiskt landarað. Afturfyri hesa tænastu fært tú eina rokning fyri árið frá QSL-støðini, og hetta ársgjaldið hevur verið einar 100-200 krónur, alt eftir, hvussu høgt postgjaldið er.
Avgreiðslan um QSL-støðirnar er ikki skjót, tí kort verða savnað saman, og so send í passandi nøgdum, fyri at halda postgjaldinum niðri, so tú skalt vera tolin, og tú kanst rokna við, at ofta verða kortini, tú fært, heldur gomul. Kann henda, avgreiðslutíðin verður eitt ár ella meira, men tíbetur er tað meira vanligt, at tú skalt rokna avgreiðslutíðina í mánaðum enn árum.

Carsten, 1CT
týðing: 2H



# *Frá nevndini*

Nevndin hevur nú loksins skipað seg. Har hendi m.a. tað, at Ole, 3QN, var noyddur at siga seg frá, áðrenn hann var komin "til arbeiðis". Hann sá, at tað fór at verða ógjørligt hjá honum, at fáa stundir til nevndararbeiði. Hann koyrir nevniliga hýrubil, og tað er ikki eitt 9-5 arbeiði. Í hansara stað kom fyrsti tiltaksmaður í nevndina, sum hevur skipað seg soleiðis:

Annfinn Hansen, OY4AH, formaður.
Frits Thorbek, OY3FT, varaformaður.
Johanna Hansen, OY5J, skrivari.
Palle Olsen, OY2VO, kassameistari.

# *CQ-WW Contest*

Vikuskiftið 24.-25. oktober var árliga CQ WW SSB-kappingin.
Jón, OY9JD, luttók fyri FRA við tí lutfallsliga nýggja kallimerkinum, OY6A, sum er ætlað til kappingarnýtslu. Kappingin byrjar fríggjakvøld á miðnátt og heldur fram næstu 48 tímarnar, og Jón, við sínari mikrofon og teldu, var í luftini í góðar 34 tímar.
Hesar tímarnar fekk hann knappliga 2600 QSO í loggina á teim 6 bondunum, 10 - 160 metrar, og gav hetta honum yvir 3 mió stig, sum er væl meira enn dupult so nógv, sum hann sjálvur fekk í 1991 í somu kapping.
Eitt risaavrik, Jón her gjørdi. Hann byrjaði týðliga leygarnáttina, og tá eg var í Hamrabú fyrrapartin leygardag - tá hevði hann koyrt í einar 10 tímar - hevði hann longu yvir 600 QSO í loggini. Jón helt fram til miðnátt sunnudagin, tá kappingin endaði, og tá vísti teldan 2557 QSO. Meðan kappingin vardi, var Jón við hús tvær ferðir at fáa sær ein bita, og einaferð hevði hann fingið sær ein lúr á sofuna í radiorúminum.
Nú verður spennandi at síggja úrslitini, sum verða kunngjørd aftur til várs, og fáa at vita, hvussu skarst.
Aðrar OY-støðir vóru eisini við í kappingini. M.a. OY1HJ, Holgar, sum hevur haft sendiloyvi í eitt ár. Hann fekk 1400 QSO í loggina, og tað mugu vit rokna sum eitt sera gott úrslit av einum so nýggjum radioamatøri, "OY-aranum" kunnugt vóru tvær aðrar OY-støðir eisini við, og tær fingu 175 og 100 QSO, og kunnu vit tí staðfesta, at ongin rakk Jón til kníggja.
Tað hevði verið hugaligt og spennandi, um nakrir CW-menn saman kundu farið í gongd við einum multi/multi liði í CW-partinum í hesari kapping seinasta vikuskifti í november.
FRA hevur fyrr verið við í hesum partinum av kappingini, men tað krevur eitt sindur av fyrireikingum í góðari tíð.

OY1A
Týðing: OY2H



# *Nýggjur formaður*



Nevndin, sum var vald á seinasta ársaðalfundi, hevur, sum frásagt aðrastaðni í blaðnum, skipað seg við Anfinni Hansen, OY4AH, sum formanni.
Nú býr formaður okkara ikki í Havn, men í Fuglafirði, og tað er rættiliga hugaligt, at felag okkara, sum jú er fyri alt landið, nú hevur ein avbygdamann, sum leiðara.
Annfinn er 42 ára gamal og starvast sum skipsmeklari. Hann er ikki ókendur við nevndararbeiði, tí hann er bygdaráðslimur og skúlanevndarformaður í Fuglafirði.
Hann fekk sendiloyvi 4. juni 1990, og hevur nú umleið 2600 QSO í loggini, bæði á CW og SSB.

# Packet-Radio

Kanska hevur tú lagt til merkis, at virksemið er á 144.675 MHz. Í oktober gav radioeftirlitið loyvi til stovnan av MAIL-BOX við kallimerkinum, OY1BBS.
Støðin hevur QTH á Nesi í Eysturoynni, og kann avgreiða 8 støðir í senn, 7 á 144.675 MHz og 1 á 14.098 MHz. Tað er nú møguligt at senda og móttaka boð og upplýsingar feilfrítt frá amatørum um knøttin allan, og í heilum koma inn upplýsingar viðvíkjandi DX, VHF, líkindum, fylgissveinum, kappingum, antennum o.s.fr. Onnur leita sær hjálp til ymiskar ætlanir, og aftur onnur leggja inn EDV-skráir til fría nýtslu. Aftur at hesum hevur MAIL-BOX ymsar møguleikar, sum t.d. at útrokna fylgissveinatíðir og nógv annað.
Flestu amatørar um Havnarleiðina røkka støðini, men loyvið er eisini fingið til OY1DIG (digipeater) á Sornfelli.
Tá hesin er QRV, skuldi MAIL-BOX verið møguligt hjá øllum.
OY1BBS er QRV alt samdøgrið.Fyri at koyra Packet mást tú eiga 2m-støð, teldu (C-64, PC ella líknandi), telduskrá/Software (fæst ókeypis) og Packet-modem.

Henrik, 9A.

# *OY9JD*

Jón, OY9JD, vildi ikki lata seg stilla upp aftur til nevndarvalið hesa ferð. Hann er nevniliga í ferð við at byggja, og har afturat er familjan eisini økt.. Jón hevur verið í nevndini í fleiri ár, og hevur virkað nøkur ár sum formaður eisini. Nú, hann gavst, var hann næstformaður.



Hann hevur haft almikið við tað tøkniliga at gera, bæði støðirnar og antennurnar í Hamrabú. Hann hevur verið nógv har yviri í húsinum, og er ivaleyst eisini tann av okkum, sum hevur nýtt tey bæði FRA-kallimerkini mest.
Áhugin fyri amatørradio er ikki vorðin minni, og hann er framvegis okkara besti kappingarluttakari, og hevur fleiri ferðir ligið væl fyri í ymiskum kappingum. Hansara seinasta avrik í so máta, havi eg nomið við aðrastaðni í hesum blaðnum í greinini um CQ-WW SSB Contest 1992.
Lagt kann vera afturat, at Jón, saman við øðrum, loypti hvøkk á radioamatørar á Suðuroyggjum, tá teirra endurtakari varð latin upp av einari OY-støð! Tá sendu okkara menn av Sornfelli, og nýttu tær stóru, fýrakantaðu rammuantennurnar á Scatterstøðini. Tað verður neyvan gjørt aftur, tí bæði antennur og bygningur verða skjótt tikin



B
Economique

Jan Egholm,
OY3JE - Lnr. 378
Postbox 3033,
110 Tórshavn.

# *DX-vánirnar*

| | |
|---|---|
| | Antarctic. KC4AAF frá McMurdo støðini til 01.02.93. Lurta á CW 3505, 7005, 14025, 21025. 28025, og SSB 7175, 14180-190. |
| HS | Thailand. Nýtt forskoyti, E2A-E2Z til nýggjar amatørar. |
| JD1 | Minami Torishima. JK1ABP til 14.01.93, all bands/modes. JK1ADP/JD1 á WARC-bondum og JA9IPX/JD1 á vanligu HF-bondunum. |
| JW | Svalbard. JW5NM QRV til summarið 94. QSL via LA5NM. |
| JX | JX3EX og JX7DFA QRV seinast í mai. |
| KH8 | American Samoa. JA3JA og JA3JM/AA5K 29.11 - 02.12 og 09-10.12. All modes/bands sum KH8/JA3JA og AA5K/AH8. QSL til JA3JA. |
| PYøT | Trinidade Island. PYøTSN fyribils. Lurta á 3790, 7090, 14190, 21290, 28490 og 50105. Møguliga eisini á 160m. |
| VS6 | Hong Kong. VS6/XW3N QRV til 30.11. |
| ZK2 | Niue. JA3JA og JA3JM/AA5K 02-09.12 sum ZK2XI og ZK2XJ. Sí KH8. |
| 5X | Uganda. DJ5RT sum 5X5WR seinast í november. |
| 9A | Kroatia. 9A/ON5AI QRV til mai 93 innan UN-deild. QSL: boks 45, B-2460, Katerlee, Belgia. |
| 9N/9V | Singapore. VK2DXI sum 9V1XE í 1993. |
| PIRATAR. | |
| | FP1AW, OHøAY, TF5TP, SYøNA, 5AøDX og 7ø1ZZ. |
| DXCC | DXCC-nevndin hevur góðkent hesar DX-ferðir:C9RJJ frá 20.07.92. F6BLQ/D2 23.06.92-23.07.92 á 10/15/20m. S21ZA frá 08.92. S92IJ frá 10.03.92. XUøNU & XU1NU 06.07.92 - 06.01.93 á 10/15/20m. ZA/KA6ZYF & ZA7/G3MHV 13.06.92 - 13.07.92. 5R8JD frá 06.+7.88 7Q7CE frá 04.06.92. |

Nýggj forskoyti:

4J Azerbaijan.
4L Georgia
EK Armenia.
RA - RZ & UA - UQ Rusland
UR - UZ Ukraine.

1A.

# *Morokulien*

Í "OY-aranum" nr.130, juli 1991, var ein grein um Morokulien - hetta serliga radiolandið á markinum millum Noreg og Svøríki,ella, um rætt skal vera rætt, so liggur tað á norskum landaøki og yvir til svenska markið.

Í summar kom eg gjøgnum Morokulien, og á tollstovuni svensku megin fekk eg, við at vísa mítt sendiloyvi og gjalda 25 krónur, lykilin til støðina. Vit fingu morgunmat í túninum, og so koyrdi eg eitt sindur sum LG5LG. Hevði m.a. samband við Knud í Godhavn, OX3KM. Heimafturkomin lá eitt kort har frá OY4AH. Hann hevði hoyrt meg tosa við OX3KM, men hoyrdi meg ikki væl.

Ein summardag fyrrapart á 20 m millum svensk-norska markið og Fuglafjørð er kanska ikki allarbest. Eg mátti fara QRT, tá eg var liðugur við Knud, og hoyrdi tíverri ikki OY4AH.

*OY1A*

P.P. Port payé
POSTGJALD GOLDIÐ